# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Barsilspengar til landskassan

Boðini vóru greið, tá Barsilsskipanin varð regulerað seinast. Nú vóru tað partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum skuldu bera kostnaðin.

Í sjálvum sær var tað væl nakað, sum øll kundu gleðast um. Ikki minst tí báðir partar her vístu vilja og evni at samstarva kring eina solidariska skipan. Tað var tó samstundis eitt ynski frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, at skipanin varð skildrað frá landskassarenslinum annars.

Tað mundu tey flestu okkara annars halda, tí fáa vit løn – ella rindar arbeiðsgevari løn – so stendur jú greitt tilskilað, hvat verður rindað í barsilsskipanina. Og tí eru tað mest sum skelkandi tíðindi, nú tað kemur fram, at innkravda upphæddin er nærum 12% størri enn tað, sum Barsilsskipanin hevur nýtt. Fór henda meirinntøkan í skipanina, var væl ikki tann stóri trupulleikin, tí tá vildi hetta fyrr ella seinni komu brúkaranum – altso barnafamiljum – tilgóðar. Men tá peningurin bert fer beinleiðis í stóra pott í landskassarenslinum er øll orsøk at rópa varskóð.

Talan er um oyramerktar upphæddir, sum verða kravdar inn. Og tí eigur hvørt oyra av hesum at koma skipanini tilgóðar. Mett eftir innkravdu upphæddini í fjør, so svarar hetta til, at barsilsfarloyvið kundi verið longt við tveimum vikum. Ella at hámarkið fyri mánaðarliga útgjaldið kundi hækkast.

Men henda veruleika tykist myndugleikin als ikki geva far. Tað trýtur annars ikki við føgrum orðum um at betra skipanina. Enntá at tvífalda tíðarskeiðið fyri farloyvi. Enn er tó einki hent, og skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum bera tann kostnaðin, verður hetta neyvan aktuelt, fyrr enn næstu sáttmálasamráðingar standa á skránni um trý ella fýra ár.

Var skipanin í grunni fyri seg, kundi hon longu nú framt batar. Batar, sum viga meira enn føgur orð.

**Sosialurin**

# Eivør og tey knúsa alt sundur

**SONNE SMITH**



Er tað veruliga so, at Eivør Pállsdóttir og aðrar føroyskar stjørnur umframt fleiri føroyskar fyritøkur eru farnar at gera um seg uttanlands, so hava vit føroyingar sum tjóð øgiligar kvalir at dragast við.

Hetta er als ikki ætlað sum puristiskt málsligt knarr. Heldur er hetta ein desperat roynd at gera vart við, hvussu ómetaliga langt av leið føroyskt mál er farið. Tí at gera Eivør og hinar stjørnurnar umframt fleiri modernaðar føroyskar superfyritøkur um seg uttanlands, so knúsa og sorla tey alt sundur. Eivør ripar gittaran eftir sínum gapandi áhoyrarum, hon sveiggjar mikrofonstativið í høvdið á konsertfyriskiparanum, og hon biður tey sleppa sær út, tí hon orkar ikki gronina í teimum.

Nei! Nei! Hetta er lygn!

Ja! Hetta er lygn, tí Eivør og hinar føroysku stjørnurnar umframt tær supermodernaðu, smartu fyritøkurnar gera sjálvandi ikki um seg uttanlands, tí so sleppa tey ongantíð aftur at hava konsert ella selja nakað uttanlands.

Sum skilst á hesi merkiligu orðføring: at gera um seg her og har, er hetta ein ógvuliga keðilig misskiljing.

Tí at gera um seg er at gera fortreð, at gera ónáðir, at skikka sær so illa, at enn ikki tey ringastu fótbóltsbartrogini høvdu torað at hugsað tankan.

# Ein misskiljing og onnur

**TÓRI HØJGAARD, FORM.**
Ung fyri Miðflokkinum

Í grein í bløðunum nú um dagarnar hevur Helgi Abrahmasen svar til grein mína "Gott at Helgi ikki er lækni". Í grein síni vísur hann á viðurskifti, ið hann metir meg hava misskilt.

Men eg eri bangin fyri, at Helgi nokk hevur misskilt eitthvørt, um hann heldur, at rokningin, ið skattgjaldarin fær, verður tann sama, óansæð um blokkurin verður avtikin eftir einari nátt, ella fleiri árum.

Lat okkum sum dømi ímynda okkum, at avgerð verður tikin um at í seinasta lagi um 10 ár skal blokkurin vera burtur. Antin strika vit blokkin í einum beinaveg, ella minka vit hann so líðandi. Niðanfyri havi eg sett eitt einfalt roknistykki upp:

Sí talvu.

**Burtur eftir einum degi:**
Eftir hesum leistinum høvdu vit fingið 600 milliónir í ár, og síðani ongan pening tey næstu 10 árini. Also høvdu vit alt í alt fingið 600 milliónir. Avleiðingarnar høvdu verið stórt hall á fíggjarlógini – júst sum Helgi hevur víst á. Also, eitt sindur av einum sjokki fyri føroyska búskapin.

**Stigvísa minking**
Hugsa vit okkum so, at avgerð heldur var tikin um at minka blokkin so líðandi, og at um 10 ár skuldi onki vera eftir, so hevði roknistykkið sæð munandi ørðvísi út, við tað at samlaða upphæddin, ið landskassin hevði fingið úr Danmark, hevði verið 3300 milliónir í okkara hugsaða dømi. Minkandi blokkurin hevði kanska givið hall á fíggjarlógini okkurt árið, men hetta hevði ikki verið eins stórt, og so hevði búskaparvøkstur og inflatión syrgt fyri, at veruliga virðið á omanfyrinevndu upphæddum eisini minkaði. Ein króna í dag hevur jú minni virði, enn hon hevði fyri 10 árum síðani, og meir enn hon hevur um 10 ár.

**Niðurstøðan av royndini:**
Niðurstøðan má tískil vera, at tað ger mun júst hvussu vit sleppa okkum av við blokkin. Ein stigvís avtøka av blokkinum, ella bara ein varðveiting av fastfrystingini, hevur als ikki somu ávirkan á búskapin sum at strika blokkin í einum.

**Aðrar misskiljingar:**
Eftir henda pástand fer Helgi víðari og sigur, at okkara tos um skiftistíð einans er ein liður í okkara roynd at lumpa Føroya fólk at loysa frá Danmark. Helgi meinar óiva við, at vit við einari avtalu um skiftistíð ætla at taka loysing beinanvegin, eins og upprunaliga var ætlanin hjá fullveldissamgonguni. Men tað er jú als ikki tað, ið er í ferð við at henda. Fastfrystingin av blokkinum hevur tryggjað, at veruliga virðið á honum minkar ár fyri ár, og at vit har við gera okkum minni bundin av donskum pengum - tað er tað, ið Miðflokkurin hevur víst á. Og sum støðan í Føroyum er nú, hevði búskapurin væl borið, at blokkurin minkaði eitt vet um ári.

At enda vil eg eisini siga, at Helgi av álvara undirmetir veljaran, tá ið hann er bangin fyri at hesin kann lumpast til at loysa frá Danmark. Tað hevði verið spell hjá Helga, um veljarnin vísti Helga sama álitið til næsta val, sum Helgi vísir veljaranum í grein síni.

**Skiftistíð ella her og nú?**

| Ár | Upphædd | Ár | Upphædd |
|---|---|---|---|
| 0 | 600 | 0 | 600 |
| 1 | 540 | 1 | 0 |
| 2 | 480 | 2 | 0 |
| 3 | 420 | 3 | 0 |
| 4 | 360 | 4 | 0 |
| 5 | 300 | 5 | 0 |
| 6 | 240 | 6 | 0 |
| 7 | 180 | 7 | 0 |
| 8 | 120 | 8 | 0 |
| 9 | 60 | 9 | 0 |
| 10 | 0 | 10 | 0 |

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.